## Armstrong ikki í Giro

Nýggja liðið hjá Lance Armstrong, Team Radioshack, verður ikki við í stóru italsku súkklukappingini, Giro d'Italia. Akkurát nú klandrast fyrireikararnir og amerikansk súkklarin um, hví Radioshack ikki er við. Armstrong sigur, at liðið boðaði longu frá hesum síðst í januar, meðan stjórin fyri Giro d'Italia roynir at fáa tað at ljóða, sum hann hevur steðgað Radioshack.



## Sandro til Tottenham

Longu nú eru fleiri av liðunum í ensku Premier League farin at hugsa um komandi kappingarár. Eitt teirra er Tottenham, sum sigst vera ávegis at tryggja sær brasilska miðvallarspælaran, Sandro, frá Internacional fyri 75 milliónir krónur. Hann er í London til læknakanning, og er hon í lagi, kemur hann til felagið í august.









# 84 lið í fýra framsýningum



**Nógv størsta ítróttarfelag í landinum, Havnar Fimleikafelag, hevur síðstu dagarnar havt sínar árligu fimleikaframsýningar**




einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen


At tað kann taka sína tíð at avgreiða árligu fimleikaframsýningarnar, tá tú ert eitt so stórt felag sum Havnar Fimleikafelag, gekk sjón fyri søgn, nú felagið hevði framsýningar bæði leygardagin og í gjárkvøldið.

Tilsamans var talan um 84 lið, ið skuldu sýna fram, so neyðugt var at deila tey sundur í fýra sýningar, skuldi tað ikki gerast alt ov nógvur maratondámur yvir tí.

Fimleikaframsýningarnar vóru í ítróttarhøllini á Hálsi. Tríggjar tær fyrstu vóru leygardagin og tann síðsta í gjárkvøldið.

Byrjað var leygarmorgunin klokkan 10 við smábørnum millum hálvtannað og seks ára aldur, og síðani varð hildið fram klokkan 13.30 við børnum úr 1. til og við 3. flokk, áðrenn tey frá 4. til 6. flokk sluppu framat klokkan 17.

Í gjárkvøldið klokkan 19 var so tann síðsta framsýningin, sum fevndi um vaksin, 7. flokk og eldri. Allar framsýningarnar endaðu við, at handaðar vórðu 5, 10 og 15 ára nálir og ídnisprógv.

Myndamaður okkara, Álvur Haraldsen, var til nakrar av framsýningunum, og á hesi opnu sæst eitt úrval av myndunum, hann tók leygardagin og í gjárkvøldið.